

*Azmai hevði merki á hálsinum av harðligu sponsku løgreglumonnunum, sum brúktu nógva megi fyri at fáa hann í hondjørn*



*Umboð fyri sponsku løgregluni søgdu, at teir vóru noyddir at handtaka Azmai, tí hann var so ágangandi*



*Azmai tosar við vinmannin Garry Kasparov, eftir at hann er sloppin úr geglinum. Kasparov sigur seg stuðla Azmai*



*– Eg ætli mær at siga mína erligu meining um tað, sum eg upplivdi og sá. Eg kann ikki gera nakað annað. Um tað so kann hjálpa Azmai, so er tað fínt, tí revsingin fyri tað, sum hann er ákærdur fyri, er upp í trý ára fonguslsrevsing. Eg helt, at tað var fullkomiliga óneyðugt, sum hann var viðfarin. Tað vóru grovar politimetodur, sigur Eyðun Nolsøe*

Mynd: Jens Kristian Vang

stóð ein frágreiðing frá Eyðun Nolsøe ovast á listanum.

– Eg var so kløkkur av hendingini, at eg skrivaði eitt bræv til Chess Base og greiddi frá tí, sum eg hevði upplivað, sigur Eyðun Nolsøe.

Nakað aftan á fekk Eyðun ein áheitan frá altjóða talvsamandinum FIDE um at vitna í málinum. Talvsambandið hevði valt trý vitni burtur úr teimum mongu fólkunum, sum høvdu sæð tilburðin, og Eyðun Nolsøe var ein teirra.

– Eg var ein av teimum, sum sat best fyri, og eg hevði eisini eygleitt Azmai áðrenn hendingini. Tað hevur helst gjørt, at teir vilja hava meg at greiða frá í rættinum.

Umframt Eyðun skal eisini liðleiðarin á amerikanska talvlandsliðnum og ein telvari av Bermunda vitna í rættinum, tá ið málið kemur fyri í rættinum á Mallorca týsdagin.

## Fer at siga sína erligu meining

Eyðun Nolsøe hevur gjørt sær nógvar tankar um tilburðin, og um hann skuldi blanda seg upp í rættarmáli, men hann er komin til ta niðurstøðu, at hann æltar sær at gera sítt fyri at hjálpa telvaranum úr Georgia.

– Eg veit væl, at Azmai er ein kontroversiellur persónur, og tí havi eg ivast í, um eg vildi hava nakað við hetta at gera. Men hetta er eisini ein samvitskuspurningur fyri meg, tí eg upplivdi nakað, sum eg helt verða skeivt. Eg helt, at Azmai hevði als ikki uppiborið slíka viðferð, tí í grundini gjørdi hann einki galið, og hann var als ikki ágangandi, sigur Eyðun Nolsøe.

– Tá ið Azmai kom til talvolympiaduna gjørdi hann eitt sindur um seg, tí hann vildi hava tvey hotellkømur, men hann fekk bara eitt. Hetta hevði helst gjørt, at fyrireikararnir og løgreglan hevði ringt eygað á honum, men tað kann ikki hava við sær, at hann skal verða so óneyðuga brutalt behandlaður.

– Eg ætli mær at siga mína erligu meining um tað, sum eg upplivdi og sá. Eg kann ikki gera nakað annað. Um tað so kann hjálpa Azmai, so er tað fínt, tí revsingin fyri tað, sum hann er ákærdur fyri, er upp í trý ára fonguslsrevsing. Eg helt, at tað var fullkomiliga óneyðugt, sum hann var viðfarin. Tað vóru grovar politimetodur, sigur Eyðun Nolsøe.

Tað er altjóða talvsambandið FIDE, sum roynir at hjálpa tí fyrrverandi varaforsetanum Azmai í málinum á Mallorca, og ein norðmaður í ovastu leiðsluni hjá FIDE skal hjálpa Eyðuni Nolsøe, tá ið hann fer til Mallorca leygardagin.

– Eg kenni meg tryggan við hendan norðmannin, tí hann er advokatur og veit, hvat alt hetta snýr seg um, sigur Eyðun, sum ikki stúrir fyri at fara til Mallorca at lata sína frágreiðing.

– Tá ið telvarar úr 140 londum annaðhvørt ár savnast til talvolympiaduna, tosa vit við stórum orðum um talvfamiljuna, sum vit øll eru partur av. Eg haldi, at slík orð forplikta, og tí vil eg gjarna hjálpa Azmai, sigur Eyðun Nolsøe.

## Azmai

Zurab Azmaiparashvili er 44 ára gamal georgiskur stórmeistari í talvi. Hann er ein profilur í talvheiminum, og á styrkislistanum hjá altjóða talvsambandinum FIDE fyri januar 2005 hevur hann styrkistalið 2662. Tað ger hann til besta telvaran í Georgia og nummar 39 í røðini av teimum sterkastu telvarunum í heiminum. Hægsta styrkistalið hevði hann í 1998, tá ið hann var heilt upp á 2810 í rating.

Azmai er formaður í georgiska talvsambandinum, og hann hevur verið ein av varaforsetunum í altjóða talvsambandinum FIDE. Í 2003 framdi hann sítt størsta leikliga avrik, tá ið hann gjørdist europameistari í einstaklinga telving.

Hann hevur verið nógv umtalaður, síðani hann var handtikin av sponsku løgregluni til endahátíðina fyri talvolympiaduna á Mallorca í november mánaði í fjør. Azmai er nú ákærdur fyri at hava gjørt seg inn á ein løgreglumann, og málið kemur fyri í rættinum á Mallorca týsdagin 1. februar. Har verður føroyski telvarin Eyðun Nolsøe eitt av vitnunum.

KYDON'S CHESS PL